# Agip tikið stig til málskeið

**Í samstarvi við Robert Gordon University hevur oljufelagið Agip tikið stig til málskeið í Aberdeen fyri tólv handverkarum, maskinmeistarum og sølumonnum frá trimum fyritøkum í Føroyum. Málskeiðið í enskum er ein fyrireiking til komandi oljuvinnuna og ein roynd at fáa føroyskar fyritøkur á útlendska marknaðin**

MÁLSKEIÐ
*Heini í Skorini*



*Tólv starvsfólk hjá fyritøkunum KJ Hydraulik, El-service og Normek eru í hesum døgum á málskeiði í enskum í Aberdeen. Oljufelagið Agip hevur tikið stig til málskeiði*

Tilsamans eru tólv starvsfólk frá trimum føroyskum fyritøkum í hesum døgum á málskeiði í enskum í skotska býnum Aberdeen, sum oljufelagið Agip skipar fyri.

Fyritøkurnar, talan er um, eru KJ Hydraulik, El-Service og Normek, og hava fyritøkurnar sjálvar valt, hvørji arbeiðsfólk skulu sendast avstað. Málskeiðið varar í tríggjar vikur, og er hetta eitt samstarv millum Agip og Robert Gordon University. Tað er Agip, sum sponsorerar og hevur tikið stig til hetta málskeið.

### Veita betri tænastu

Ólavur Gregersen, vinnuráðgevi hjá Agip, sigur, at endamálið er at hjálpa føroyskum fyritøkum at koma á enska og eventuelt norska marknaðin, m.a. við at betra um førleikan í enska málinum.

– Við slíkum málskeiði verða starvsfólkini betri før fyri at selja og finna kundar uttanfyri landoddarnar, og fyritøkurnar kunnu veita betri tænastu millum útlendskar fyritøkur eftir eitt slíkt málskeið, sigur Ólavur Gregersen.

Teir tólv føroyingarnir í Aberdeen eru sum sagt frá fyritøkunum KJ Hydraulik, El-Service og Normek, og er talan um handverkarar, maskinmeistarar og sølumenn. Agip sponsorerar málskeiðið og setir pening í føroyska førleikamenning, sum bæði Agip, men eisini onnur oljufeløg, væntandi koma at njóta gott av.

Tað er nevniliga soleiðis, at loyvi til oljuboring í føroyskum sjógvi ber í sær, at øll oljufeløgini skulu seta pening í føroyska førleikamenning og sostatt leggja pening eftir seg í føroyska samfelagnum.

### Fyrireiking til oljuvinnu

Málskeiðið er eisini ein liður í fyrireikingunum til eina komandi oljuvinnu, har maskinmeistarar, handverkarar o.s.fr. fáa stóran týdning. Ein ógvuliga stórur og týdningarmikil partur í eini komandi oljuvinnu er tekniski parturin, t.d. umborð á ymsu platformunum, og tískil fáa oljufeløgini uttan iva brúk fyri teimum arbeiðskreftum, sum í hesum døgum sita við sveittabroti á Robert Gordon University í Aberdeen og læra seg enskt.

Umframt, at fyritøkurnar við hesum málskeiði verða betri førar fyri at veita tænastur á enska marknaðinum, vísir Ólavur Gregersen eisini á, at hesar fyritøkur fáa týdning í oljuvinnuni, og at enska málið er ein týðandi partur í hesi vinnu.

– Óbeinleiðis njóta vit gott av hesum, men tað gera onnur oljufeløg eisini, sigur Ólavur Gregersen. Øll oljufeløgini fáa nevniliga brúk fyri væl útbúnum fólki í eini komandi oljuvinnu, har enska málið ikki minst er ein týðandi partur.

### Hava verið á platformi

Málskeið er ikki einasta tiltak í føroyskari førleikamenning, sum Agip í hesum føri fíggjar. Føroysk starvsfólk vóru nevniliga í mai í ár á einum oljuplatformi, har tey vóru upplýst og víst kring platformin. Sostatt verða mong ymisk og fjølbroytt tiltøk fyriskipað í royndunum og fyrireikingunum bæði at fáa føroyskar fyritøkur á útlendska marknaðin, men eisini at fyrireika føroyska arbeiðsmegi til eina møguliga komandi føroyska oljuvinnu.

# Telduspælið hjá Agip roynt

**Í apríl mánaði tók oljufelagið Agip stig til at gera eitt telduspæl um oljuleiting. Nú verður síðsta hond løgd á verkið, og ætlanin er, at spælið verður tikið í nýtslu í november mánaði**

TELDUSPÆL
*Heini í Skorini*



*Ólavur Ellefsen, vinstrumegin, hevur programmerað nýggja oljuspælið Xplore, sum Ólavur Gregersen, høgrumegin, og oljufelagið Agip hava givið út*

Sum liður í førleikamenning til føroyska oljuvinnu, hevur oljufelagið Agip eisini gjørt eitt telduspæl, ætlað til næmingar á miðnámsskúlum. Spælið, sum ber heitið Xplore, er tengt at alnótini, og gongur tað út uppá at leita eftir og finna olju. Spælið er gjørt á slíkan hátt, at tað avspeglar veruleikan so nógv sum gjørligt, og har mannagongdin í oljuboring, sáttmálum, seismiskum kanningum o.s.fr. líkist sera nógv veruleikanum

Ólavur Gregersen, vinnuráðgevi hjá Agip, sigur, at endamálið er at geva miðnámsnæmingum innlit í føroyska oljuvinnu, og hann sigur, at spælið gevur eina góða mynd av, hvussu oljuleiting og oljuvinna í veruleikanum fer fram.

### Spælið roynt

Í juni mánaði varð Xplore telduspælið roynt fyri fyrstu ferð av miðnámslærarum og fólki frá oljumálastýrinum, og sambært Ólavi Gregersen royndist spælið væl, hóast tað ikki er til reiðar at taka í nýtslu enn.

– Vit fara at royna spælið aftur í september, og nakrar rættingar skulu gerast afturat, áðrenn spælið verður liðugt, sigur Ólavur. Spælið hjá Agip er gjørt í samstarvi við føroysku fyritøkurnar Sansir og Tøkni. Ólavur Ellefsen, sum starvast á Tøkni, hevur programmerað telduspælið, og um kostnaðin av spælinum sigur vinnuráðgevin í Agip, at tað táttar upp ímóti einari millión.

### Kapping millum miðnámsskúlar

Tá spælið er liðugt, skipar Agip fyri eini kapping millum miðnámsskúlar, og skal henda kapping vara umleið 2-3 vikur.

Um tíðarætlanin heldur, verður fyrsta telduspælið um føroyska oljuvinnu til reiðar at spæla í november mánaði, og verður hetta vónandi við til at upplýsa føroyskan ungdóm um, hvat veruliga gongur fyri seg á skrivstovum hjá oljufeløgum og úti á víðum havi, tá borað verður eftir svarta gullinum í undirgrundini.



Sjúrður Skaale, fyrrverandi kunningarráðgevi á Løgmansskrivstovuni:

# Fortíðin nýtt at hótta løgmann við

**– Eg veit, at fólk hava lagt trýst á Anfinn Kallsberg, løgmann, og hótt hann við at »siga hitt« fyri at fáa síni mál ígjøgnum, sigur Sjúrður Skaale, sum til fyri hálvum øðrum ári síðani var kunningarráðgevi á Løgmansskrivstovuni**

FORTÍÐIN HJÁ LØGMANNI
*Eirikur Lindenskov*



*Sjúrður Skaale, fyrrverandi kunningarráðgevi á løgmansskrivstovuni og núverandi skrivari hjá Tórbjørn Jaocbsen, fólkatingsmanni, sigur, at fólk hava lagt trýst á løgmann fyri at fáa ávís mál ígjøgnum við at hótta við at »siga hitt« um fortíðina hjá løgmanni*

– Eg veit ikki, hvussu ofta vápnið hevur verið brúkt, men eg veit, at tað er brúkt! Hetta sigur Sjúrður Skaale, fyrrverandi kunningarráðgevi á Løgmansskrivstovuni.

Í einum lesarabrævi í Dimmalætting beint fyri ólavsøku sigur hann, at nógv hava vitað um óreglusemið hjá løgmanni, tá hann hevur flutt pengar óregluliga millum partafeløg – málið, sum Tórbjørn Jacobsen, fólkatingsmaður, rættuliga blásti lív íaftur fyrr í summar.

Sjúður Skaale sigur, at hetta hevur verið ein plága fyri løgmann, tí hetta hevur givið fólki eitt skitið vápn at brúka móti honum.

Vit hava biðið Sjúrð Skaale útgreinað hetta eitt sindur meira, men hann sigur við Sosialin, at hann í løtuni ikki fær sagt meira enn tað, sum stendur í lesarabrævinum, og tað endurtekur hann fyri okkum.

Sjúrður Skaale hevur arbeitt undir løgmanni, men í dag arbeiðir hann fyri Tórbjørn Jacobsen, fólkatingsmann. Hann varð settur í starv á Løgmansskrivstovuni í apríl í 1999, og fór hann úr starvinum í januar 2001, tá hann fór í starv sum blaðmaður á Fregnum, sum í stóran mun hevur hýst sjónarmiðum hjá Tjóðveldisflokkinum og Tórbjørn Jacobsen. Men uppgáva hansara á Løgmansskrivstovuni var arbeiði í sambandi við Hvítubók, og hevði starvið heitið »kunningarráðgevi«.

Sjúrður Skaale leggur dent á, at vitan hansara um pressiónina móti løgmanni ikki stavar frá tíð hansara á Løgmansskrivstovuni. Hetta er nakað, hann hevur fingið at vita seinni. Hann vil ikki siga, í júst hvørjum máli, henda pressión hevur verið brúkt, men at tað hevur verið í einari politiskari orrustu, sum hevur verið eftir januar 2001.

Sjúrður Skaale sigur, at hetta hevur skert møguleikarnar hjá Anfinn Kallsberg at leiða smgonguna, og at tað helst eisini man hava verið orsøkin til tað óskiljandi vinglaríið hjá løgmanni, sum vit mangan hava upplivað.

Anfinn Kallsberg, løgmaður:

# Hatta er nýtt fyri mær



*Hvørki Annfinn Kallsberg ella Høgni Hoydal kenna nakað til, sum Sjúrður Skaale, fyrrverandi kunningarráðgevi á Løgmansskrivstovuni førir fram*

**Anfinn Kallsberg kennir einki til, at nakar skal hava lagt trýst á hann við at hótta við fortíðini. Høgni Hoydal heldur, at partarnir eiga at greiða málið alment**

FORTÍÐIN HJÁ LØGMANNI
*Eirikur Lindenskov*

– Hasum trupulleikanum havi eg ongantíð møtt fyrr – hatta kenni eg als einki til!

Tað er greiða niðurstøðan hjá løgmanni, tá vit spyrja hann, um tað passar, at fólk ella bólkar hava lagt trýst á hann um at taka ávísar avgerðir við at hótta hann við fortíðini, so sum fyrrverandi kunningarráðgevin hjá løgmanni, Sjúrður Skaale, førir fram.

– Eg kenni ikki eitt einasta dømi, sigur Anfinn Kallsberg, sum undrast á, at Sjúrður Skaale skal halda kenna meira til slík viðurskifti, enn hann sjálvur.

Høgni Hoydal, varaløgmaður og formaður Tjóðveldisfloksins, kennir heldur eingi slík dømi.

– Eg kann bara endurtaka tað, sum eg havi sagt fyrr, at slík mál eiga at verða greidd millum teir persónar, sum eru partar í málinum. Men tá slík mál eru komin fram í fjølmiðlunum, so er best, at menn taka tey upp alment og greiða tey alment.

Høgni Hoydal heldur, at tað má standa fyri egnu rokning hjá Sjúrða Skaale, at hann kemur fram við slíkum. Tað kann ikki teingjast saman við luti hansara sum skrivari hjá Tjóðveldisflokkinum.

– Tað lættasta er at spyrja persónarnar sjálvar, um fortíðin kanska er brúkt at leggja trýst á teir aftan fyri gardinurnar, sigur formaður Tjóðveldisfloksins.

# Fult á Handilsskúlanum

**Á Handilsskúlanum á Kambsdali hava tey hvørki merkt vøkstur ella minking seinastu árini. Talið á næmingum hevur verið rættiliga støðugt, og áhugin fyri at sleppa á Handilsskúla er stórur**

SKÚLI
*Ingrid Bjarnastein*



*Næmingatalið á Handilsskúlanum hevur seinastu árini verið ógvuliga støðugt, sigur Elsa Maria Olsen, deildarstjóri á Handilsskúlanum á Kambsdali*

*Savnsmynd*

Undir liðini á Studentaskúlanum á Kambsdali liggur Handilsskúlin. Og eisini har verða dyrnar latnar upp um slakar tvær vikur. Elsa Maria H. Olsen, deildarstjóri, sigur, at áhugin fyri at sleppa á Handilsskúla er stórur.

– Vit hava ikki merkt nakað serligt til vøkstur ella minking tey seinastu árini. Um tað er nakað, so er tað vøkstur, tí áhugin fyri at sleppa á handilsskúla vísir seg at vera ógvuliga stórur, sigur Elsa Maria Olsen.

– Vit noyðast at vera selektiv tá tað kemur til næmingar, og velja tey bestu burturúr, og í ár haldi eg, at vit hava eitt miðaltal, sum liggur á umleið 9 fyri teir næmingarnar vit taka inn.

Elsa Maria Olsen vísir á, at fortreytirnar fyri at sleppa inn á Handilsskúla eru tær somu sum á Studentaskúlanum, og ein eigur ikki at taka tað fyri givið at sleppa inn á ein miðnámsskúla.

### Vantandi lestrarvegleiðing

Elsa Maria Olsen heldur ikki, at tær góðu tíðirnar hava ávirkað Handilsskúlan tað stóra, hvat næmingatalið viðvíkur.

– Vit vóru bangin fyri, at talið fór at falla, men tað hava vit ikki merkt nógv til, tí umsóknartalið er sera gott í ár. Men tað vísir seg, at fiskivinnan tekur nógv fólk, tí eftir 10 ár í skúla vilja tey ungu heldur forvinna pening. Men hetta er ofta ikki longur enn í eitt ár ella tvey, so venda tey aftur, sigur Elsa Maria Olsen.

– Men ein merkir væl, at fólk heldur vilja út at arbeiða enn í skúla.

Á Handilsskúlanum á Kambsdali verða tann 19. august tríggir FHS flokkar og tveir HH flokkar – ein til hvørt árið.

Stórur áhugi vísir seg eisini at vera fyri at taka HH yvir eitt ár. Men hetta letur seg ikki so væl gera, tí hetta er ikki nakað Mentamálstýrið og tann politiski myndugleikin ynskir at seta pengar í, heldur Elsa Maria Olsen.

– Tað eru nógv, sum ynskja at sleppa inn á HH, yvir eitt ár. Vit kundu væl tikið ein flokk inn í ár, og okkurt árið kundu tað væl verið tveir flokkar. Vit hava roynt at integrera nakrar av teimum inn í teir flokkarnar, sum hava verið – í minsta lagi har pláss er fyri teimum.

Elsa Maria Olsen heldur, at grundirnar eru nógvar fyri, at so nógv ynskja at sleppa inn á HH yvir eitt ár. Ein av teimum er vantandi lestrarvegleiðing.

– Ov lítið verður gjørt við at kunna næmingarnar um, hvat tað inniber at fara á Handilsskúla og Studentaskúla, og tí velja tey ofta at fara á student. Men tá tað so kemur til stykkið, uppdaga tey, at áhugin er fyri at lesa nakað heilt annað, og tí vilja tey sleppa á Handilsskúla.

– Sjálv haldi eg, at hetta er ein góð kombinatión. Tey, sum taka HH yvir eitt ár, eru eldri og meira búgvin. Tey eru ógvuliga málbevíst, og ein merkir á teimum, at hetta eru nøkur, sum veruliga tíma í skúla, greiðir Elsa Maria Olsen frá.

Men hon vísir á, at um næmingarnir vistu, hvat teir valdu áðrenn teir fóru á skúla, hevði tað sjálvandi verið betri.

– Men vit hava eitt spennandi skúlaár fyri framman, tað er so heilt vist, sigur Elsa Maria Olsen at enda.